# Vegleiðingin til lærarar

Tími 1 - Hvat er arbeiðsumhvørvi?

**Fyrireiking til framløguna:**

Les vegleiðingina áðrenn tíman, so tú veitst nær tú skalt vísa filmar og hvat tilfar skal prentast áðrenn.

## Mynd 1

### Vegleiðing:

Greið frá um undirvísingarpakkan og hví tað er av týdningi.

Undirvísingarpakkin hevur til endamáls at geva næmingum innlit í, hvat eitt arbeiðsumhvørvi er og hvussu tað ávirkar okkum í gerandisdegnum.

Gjøgnum seks tímar fara næmingar at læra at vera vitandi um viðurskifti á arbeiðsplássinum, sum ávirka teirra sálarligu og kropsligu heilsu og sostatt verða tey fyrireikað til eitt langt og sunt arbeiðslív. Í tímunum fara næmingar at hoyra sjónarmið hjá einum granskara viðvíkjandi evnunum, ið verða løgd fram.




**Endamálið við hesi ætlan:**

Gev eina stutta innleiðslu um hvussu hetta tilfarið varð til og hvussu tað varð gjørt.

---

## Mynd 2

### Vegleiðing:

Norðurlendska Ráðharraráðið er almenni samstarvsbólkurin hjá norðurlendsku stjórnunum.

Norðurlendska Ráðharraráðið arbeiðir fyri sameindum norðurlendskum loysnum innan øki, har tey norðurlendsku londini kunnu fremja betri úrslit við at samstarva, heldur enn at arbeiða sjálvstøðugt.

Eitt gott arbeiðslív er av stórum týdningi í menningini av norðurlendsku vælferðarsamfeløgunum, í vinnu og fyri hvønn einstakling.

Ein vanligur norðurlendskur arbeiðsmarknaður er eitt grundarlag fyri norðurlendskt samstarv. Samstarvið fevnir um størv og arbeiðsmarknaðin, umframt arbeiðsumhvørvið og arbeiðsrætt.




**Endamál:**

Gev eina stutta innleiðslu um hvat Norðurlendska Ráðharraráðið er.

---

## Mynd 3

### Tími 1 endamál:

Í hesum fyrsta tímanum skulu næmingar skilja hvat eitt arbeiðsumhvørvi er, og vera før fyri at nevna nøkur ymisk viðurskifti í arbeiðsumhvørvinum, ið kunnu ávirka, hvussu ein hevur tað til arbeiðis. Næmingar skulu skilja, at tað eru tveir ymiskir partar av einum arbeiðsumhvørvi, kropsligt og sálarligt.

Eftir hesa innleiðslu vísir tú ein stuttan film við dømum um ymisk arbeiðsumhvørvi.




**Endamál:**

Gev eina stutta innleiðslu um hvussu hetta tilfarið varð til og hvussu tað varð gjørt.

# Mynd 4

## Vegleiðing:

Bið næmingarnar geva sær far um, hvat teir síggja í filminum.

Byrja filmin.



### Endamálið við filminum:

Filmurin vísir, hvussu ymisk arbeiðsumhvørvi kunnu vera - tey síggja øðrvísi út, øll gera ymiskt, men tað er enn eitt arbeiðsumhvørvi.

---

# Mynd 5

## Vegleiðing:

1. Spyr næmingarnar ein opnan spurning: Hvussu halda tit, at arbeiðsumhvørvið kann ávirka okkum? Tú kanst eisini brúka filmin til at hjálpa. Lurta eftir svarunum hjá næmingunum.

2. Vís myndirnar og spyr spurningarnar: Hvussu nógv av okkara tíð, tá vit eru vakin, brúka vit til arbeiðis (í miðal)?

Lat næmingarnar gita og trýst síðan á svarið.

Svar: Umleið 1/3 av tíðini - er galdandi í Svøríki og telur eisini vikuskifti, halgidagar og frítíð í 4 vikur.

**Her eru nøkur dømi, sum tú kanst geva næmingunum, um ávirkanina hjá arbeiðsumhvørvinum:**

- Um tey sita ella lyfta skeivt nú, tá tey eru ung, so kann tað elva til skaðar og ampa, sum kann enda við, at tey ikki kunnu halda fram at arbeiða.

- Høg krøv og vónir av at klára seg væl í sínum arbeiði ella lesnaði økir um vandan fyri strongd, sum kann føra til bæði sálarliga og kropsliga sjúku.

- Tað er týdningarmikið at verja hoyrnina, meðan tú ert ungur, so tað ikki endar við hoyrnartapi seinni, sum kann merkja, at tú mást skifta starv.




### Endamál:

Gev eina innleiðslu og eina frágreiðing um arbeiðsumhvørvið sum hugtak, og fá næmingarnar at kjakast um, hvat tað fevnir um.

# Vegleiðingin til lærarar

Tími 1 - Hvat er arbeiðsumhvørvi?

## Mynd 6

### Vegleiðing:

Greið frá, at arbeiðsumhvørvið vanliga er býtt í tveir partar (aspektir) kropsligt og sálarligt.

**Kropsligt arbeiðsumhvørvi**
Hvussu kroppurin verður ávirkaður av at arbeiða

**Sálarligt arbeiðsumhvørvi**
Hvussu tú sálarliga og sosialt verður ávirkaður av at arbeiða.




**Endamál:**
Lýs gjøllari kunnleikan um eitt arbeið-sumhvørvi, sum hugtak - greið frá, at tað ávirkar okkum kropsliga og sálarliga.

---

## Mynd 7

### Vegleiðing:

Byrja filmin.

Bið næmingarnar geva sær far um, hvat tey síggja, tí at aftaná filmin skulu tey kjakast um, hvat kropsliga arbeiðsumhvørvið fevnir um.



**Endamál:**
Í filminum fara tey at síggja dømi um, hvat eitt kropsligt arbeiðsumhvørvi kann vera.

---

## Mynd 8

### Vegleiðing:

1. Lat næmingarnar hugsa um, hvat tey sóu í filminum og hvussu tað kann bindast saman við kropsliga arbeiðsumhvørvið. Spyr næmingarnar hvørji viðurskifti tey halda, at kropsliga arbeiðs-umhvørvið fevnir um. Um næmingar hava uppskot, tosa so um hesi.
2. Trýst á dømini og vís viðurskiftini.

**Viðurskifti í kropsliga arbeiðsumhvørvinum**

**Ergonomi og trýst**
Hvussu tú situr, stendur og gongur.

Hvørji amboð tú brúkar og hvussu tú, eitt nú, lyftir og berur okkurt tungt.

**Ljóð, ljós og luft**
Hvussu upplivir tú tínar kropsligu umstøður, verður tú blindaður av bjørtum ljósum?

Er tað nóg heitt?

**Tøkni, tól, hættislig evni og trygd**
Hvussu hjálpartól ávirka okkum. Alt frá telduforrit til verndarútgerð.




**Endamál:**
Gev eina innleiðslu og eina frágreiðing um arbeiðsumhvørvið sum hugtak, og fá næmingarnar at kjakast um, hvat tað fevnir um.

## Mynd 9

### Vegleiðing

Byrja filmin.

Bið næmingarnar geva sær far um, hvat tey síggja, tí at aftaná filmin skulu tey kjakast um, hvat sálarliga arbeiðsumhvørvið fevnir um.



**Endamál:**
Í filminum fara tey at síggja fleiri ymisk viðurskifti, sum kunnu vera í sálarliga arbeiðsumhvørvinum. Hetta er fyrireiking til bólkakjakið, sum verður um hetta evnið.

---

## Mynd 10

### Vegleiðing:

1. Lat næmingarnar hugsa um, hvat tey sóu í filminum og hvussu tað kann setast í samband við sálarliga arbeiðsumhvørvið.
Spyr næmingarnar hvørji viðurskifti tey halda, at sálarliga arbeiðsumhvørvið fevnir um. Um næmingar hava uppskot, tosa so um hesi.

2. Vís dømini og viðurskiftini.

**Dømi um viðurskifti í sálarliga arbeiðsumhvørvinum**

**Strongd og krøv**

Strongd kann koma av stríðum, tíðarneyð, broyting og ov lítlum svøvni.

**Leiðsla**

Tað er týdningarmikið, at tú kennir teg stuðlaðan av tínum leiðara og starvsfelagum, at tú fært rós og er virðismettur, og at samskifti er týðiligt millum starvsfelagar.

**Vælferð**

Felagsskapur, menningaruppgávur, at tú hevur kensluna av, at tú hevur ávirkan og at tú hevur samband við onnur.




**Endamál:**
Gev eina innleiðslu og eina frágreiðing um arbeiðsumhvørvið sum hugtak, og fá næmingarnar at kjakast um, hvat tað fevnir um.

---

## Mynd 11

### Vegleiðing:

Byrja filmin

Granskari, David Hallman, greiðir stutt frá, hví arbeiðsumhvørvi er kunnleiki, sum næmingarnir kunnu taka við sær alt lívið.



## Mynd 12




### Markmið
Fáðu nemendur til að finna dæmi út frá eigin reynslu af vinnuumhverfinu.

### Vegleiðing
**1.Næmingarnir skulu nú kjakast í pørum ella bólkum um spurningarnar á framløgumyndini (slide). Spurningarnir eru:**

- Hvat arbeiðsumhvørvi hevur tú í skúlanum?

- Hevur tú verið á øðrum arbeiðsplássum og sæð onnur arbeiðsumhvørvi? Hvussu upplivdi tú arbeiðsumhvørvið har?

Um næmingarnir hava tørv á dømum um arbeiðspláss, kanst tú leiðbeina við at spyrja, um tey hava verið í starvslæru, hava havt summarstørv ella gjørt okkurt fyri eitt felag.

Hvør kjakbólkur skal velja tvey dømi, sum tey hava tosað um, og siga hinum í flokkinum um hesi dømini.

**2.Skriva heitini "Kropsligt" og "Sálarligt" á talvuna.**

Næmingarnir skulu royna at finna eitt dømi um sálarligt arbeiðsumhvørvi og eitt dømi um kropsligt arbeiðsumhvørvi.

Vel annað av hesum báðum:

- Hvør kjakbólkur skrivar síni dømi á talvuna undir hóskandi heitið.

- Hvør kjakbólkur sigur síni dømi og tú skrivar tey talvuna undir hóskandi heitið.

Tá ið dømini hjá øllum bólkunum eru komin á talvuna, tak so saman og viðmerk stutt dømini, sum tey eru komin við. Tá tú tekur samanum, kanst tú nýta hesar spurningarnar til at hjálpa:

- Hvørji viðurskifti í arbeiðsumhvørvinum hava næmingarnir upplivað?

- Vóru flest dømi givin um viðurskifti um kropsligt ella sálarligt arbeiðshvørvi? Hví kann tað vera?

---

## Mynd 13




### Endamál:
Gev innlit í næsta tíma, tá vit fara at hyggja at, hvat ger okkum frísk og hvat kann vera ein vandi í arbeiðsumhvørvinum.

### Vegleiðing:
Nú er framløga 1 liðug, og til næstu ferð kunnu næmingarnir hugsa um hendan spurningin: Hvat ger teg frískan/sunnan til arbeiðis?